# Fingu bronsu hóast alt

*Hondbóltur, kvinnur: Kyndil tryggjaði sær bronsumerkini, tá tær uttan stórvegis hóvasták vunnu tryggan sigur á VB, sum sostatt endaði árið uttan at fáa hevnd fyri taptu steypafinaluna*

Jákup Mørk

Kyndil-VB 31-26 (13-9)

Tað var við eini vón um at hevnað ósigurin í steypafinaluni, at vágsgenturnar sunnudagin komu til Havnar. Samstundis var talan um seinasta landskappingardystin fyri teirra viðkomandi hetta árið, og tí vildu tær eisini prógva, at hóast úrtøkan ikki hevur nakað serlig hetta árið, so megnaði liðið at spæla góðan hondbólt.

Kyndil hevði tó eisini sítt at spæla fyri. Hóast vónin um fyrst gull- og síðani silvurkrónur var fokin, so høvdu tær við einum sigri møguleikan at tryggja sær bronsumerkini.

Tað tykist kanska ikki av so nógvum, tá talan er um tvífaldar føroyameistarar, men kortini betur enn einki, og harumframt var hetta eisini seinasti dysturin hjá Kyndli á hesum sinni.

**Lagið gott hesuferð**

Tað gjørdist eisini rættuliga skjótt greitt, at kyndilskvinnurar um ikki annað vildu enda árið á sømiligan hátt. Beinanvegin vunnu tær seg fram um VB-liðið, og hóast munurin onkuntíð tødnaði, so øktist hann fyri tað mesta, og rættuliga í vanda kom sigurin ongantíð.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki var munurin heilt uppi á tíggju málum, men seinastu løtuna fekk VB kortini minkað um munin, soleiðis at tað at enda vóru fimm mál, sum skiltu partarnar.

Serliga var tað Lotte, sum hevði stillað sær kanónina rætt inn henda dagin. Ikki tí, skot hennara eru ikki av teimum allar harðastu, men aloftast hava tey kós móti handara málhornið, og har kann vera nakað torført hjá málverjunum at røkka.

Lotte var tó á ongan hátt einsamøll á vøllinum, og yvirhøvur sýndu kyndilskvinnurnar við avrikinum sunnudagin, at tær hóast alt eiga at verða roknaðar millum bestu kvinnulið í landinum. Hóast útskiftingin á liðnum í ár hevur verið nakað stór, so er dygdin á leikarunum uttan iva nóg góð, men hinvegin hevur spælihugurin verið nakað skiftandi.

Serliga eftir at tær fyri á leið eina mánaði síðani taptu fyri Stjørnuni, og harvið mistu møguleikanum fyri gullmerkjunum, hevur tað verið sjónligt, at leikararnir ikki hava lagt so nógv í avrikini. Sunnudagin fingu tær sett eitt virðiligt punktum fyri árinum, sum hóast alt hevur givið teimum fyrsta steypasigurin nakrantíð, so heilt galið hevur árið kortini ikki verið.

**Onga hevnd**

VB fekk sostatt ikki hevnd fyri tapið í steypafinaluni, og yvirhøvur má sigast, at tær als ikki høvdu nakran serliga góðan dag sunnudagin.

Yvirhøvur hevur úrtøkan hjá liðnum verið heldur soltin hetta árið, sæð í mun til tær dygdir, sum liðið hevur, men í øllum førum tykist greitt, at hondbólturin har suðuri er á veg fram.

Í fleiri dystum hava tær verið sera nær við at koppa ovaru støddu liðunum, men bert ta einu ferðina hevur hetta eydnast teimum. Uttan iva hava tær ætlanir um fleiri sigrar av hesum slag komandi ár, og megna tær at halda fast um fólkið, samstundis sum meira verður sett við, er einki at ivast í, at møguleikarnir fyri eini betri endastøðu eru til staðar komandi ár.



*Hóast úrtøkan í hesum kappingarárinum hevur verið misjøvn, so megnaðu kyndilskvinnurnar at enda at ogna sær bronsumerkini*

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**

Kyndil: Lotte Sørensen 11 (2), Jórun Ludvig 7, Rakul Joensen 4, Brynhild Klein 4, Anya Midjord 2, Palma Petersen 2

VB: Regina Rádó 8 (4), Gurið Mortensen 6, Arnleyð Krosslá 5, Sólrun Krosslá 5, Rannva Augustinussen 1, Christina Holm 1

**Brotskøst:**

Kyndil 2, VB 4

**Útvísingar:**

Kyndil 1, VB 1

**Dómarar úr Neistanum/ H71:**

Kristian Johansen og Kristian Martin Skála

# Eingin spenningur

*Dysturin millum Kyndil og KÍF gjørdist ongantíð tað stóra hondbóltsupplivilsi fyri áskoðararnar. Til tess var munurin millum liðini bæði alt ov stórur*

Jákup Mørk

Kyndil-KÍF 33-22 (21-7)

Síðani tað fyri nøkrum vikum síðani gjørdist greitt, at Kyndil ikki skuldi hava nakran aktivan leiklut í FM-stríðnum hetta kappingarárið, hevur tað verið so sum so við motivatiónini hjá leikarunum á liðnum.

Ikki tí, spæl teirra hevur til tíðir verið rættuliga gott, men hinvegin hevur tað í ávísum førum eisini verið sjónligt, at stríðshugurin og viljin til at vinna ikki hevur verið tann sami, sum hann oftani hevur verið fyrr.

Sunnudagin áttu teir so heimadyst móti Kollfirðingum, og tá talan var um seinasta heimadyst hetta árið, var um ikki annað væntandi, at Kyndil ætlaði at siga áskoðarunum farvæl við einum sigri.

Ikki var væntandi, at kollfirðinganir, sum alt árið hava verið niðarlaga staddir, skuldu skala kyndilsleikarunum, og soleiðis varð heldur ikki.

**Eingin ivi**

Kyndil setti seg nevnliga á dystin frá fyrsta bríksli, og satt at siga var ongantíð vandi fyri, at kollfirðingarnir skuldu gera teimum ónáðir.

Eftir at Hans Áki hevði lagt fyri við fýra málum á rað, var kósin líka sum sett, og restina av hálvleikinum kundu kyndilsleikararnir kappast um, hvør teirra megnaði at skjóta flestu málini.

Hetta førdi eisini við sær, at nærlagni í verjupartinum ikki var tað heilt stóra, men málverjin er har til tað samma, tað sá út til, at Lars hevði sera gott tak á kollfirðingunum henda dystin.

Riggaði verjuparturin illa í fyrra hálvleiki, so var støðan ikki betur í seinna. Ikki tí, sigurin kom ongantíð í vanda, eftir at Kyndil hevði skotið tríggjar ferðir so nógv mál sum KÍF fyrsta hálva tíman.

Leikararnir vóru so at siga fullkomuliga líkasælir um, hvussu leikur fór seinasta hálva tíman, og kollfirðingar fingu tí loyvi til at minkað eitt sindur um tapið.

**Kanska ikki so galið**

Tað man ikki vera nakað dulsmál, at sigursvandu kyndilsleikararnir og ikki minst áskoðararnir høvdu vónað, at lið teirra fór at standa seg nakað betri hetta kappingarárið, enn teir hava gjørt.

Fjórða plássið er nú teirra, líkamikið hvussu leikur fer í seinasta dystinum, og ivaleyst munnu nógv ár vera síðani Kyndil hevur verið uttan fyri heiðursmerkjarøðina.

Steypakappingina hava teir tó kortini vunnið, so heilt spilt hevur árið ikki verið, og harafturat eigur at vera havt í huga, at talan í stóran mun hevur verið um rættuliga ungar leikarar á flestu plássunum.

Tískil eigur endaliga støðan ikki at verða tikin sum eitt tekin um, at Kyndil nú er á veg niðureftir, men heldur soleiðis, at teir nú eru í ferð við at byggja eitt nýtt lið upp.

Hvussu langt hetta fer at røkka er óvist, men við miðvísum arbeiði og eitt lítið sindur av tí hepni, sum teir ikki hava havt í ár, kann komandi kappingarár laga seg munandi betri hjá teimum.

**Dysturin í tølum**

**Málskjúttar:**

Kyndil: Hans Áki Dahl Christiansen 9, Jacob Jónsson 6 (1), Rúni Poulsen 5, Bjarni Wardum 5, Uni Wardum 4, Regin Petersen 2, Niels Viggo Niclasen 1, Rúni Mohr 1

KÍF: Eddie Joensen 7, Vagnur Johannesen 5, Petur Martin Johansen 3 (1), Jónálvur Johannesen 2, Kristian Madsen 2, Óli Kristitan Djurhuus 1, Jákup Dam 1, Petur Martin Poulsen 1 (1)



**Brotskøst:**

Kyndil 2, KÍF 4

**Útvísingar:**

Kyndil 2, KÍF 4

**Dómarar úr Neistanum/ H71:**

Kristian Johansen og Kristian Martin Skála





# Gallakvøld fyri hondbóltinum

*H71 skipar aftur í ár fyri stórari gallaveitslu, sum á sín hátt markerar endan á einum væleydnaðum kappingarárið. Tiltakið er í ár flutt út á Læraraskúlan, har hølini eru nakað rúmligari, men annars verða ikki tær stóru broytingarnar í mun til væleydnaða kvøldið undanfarna ár*

Jákup Mørk

Fyri at markera endan av kappingarárinum, varð stór gallaveitsla hildin fyri hondbóltinum fyri einum ári síðani. Tiltakið tað ferðina somikið væleydnað, at fyrireikararnir úr H71 beinanvegin gjørdu av, at teir aftur í ár skuldu skipa fyri líknandi tiltaki.

**Næstan komið á mál**

Nú er næstan komið á mál við fyrireikingunum til tiltakið, hóast einstakir smálutir enn ikki komnir upp á pláss.

Undanfarna ár varð veitslan hildin uppi í Hoydølum, og hølini vóru so at siga fullsett tað ferðina. Uppmøtingin kundi tá verið enn betri, um ikki drúgva verkfallið hjá Starvsmannafelagnum hevði órógvað samferðsluni her á landi, og tí rokna fyrireikararnir við, at hølini hjá studentaskúlanum verða ov trong at halda veitsluna í hesu ferð.

Tískil er gjørt av, at gallakvøldið nú verður flutt út á Læraraskúlan, har fleiri fólk rúmast.

8. apríl er settur at vera dagurin, og verður boðað frá, at veitslan er ásett at byrja kl. 20.00.

**Hátíðardámur**

Leisturin, sum tiltakið verður gjørt eftir, er nógv álíkur undanfarna ári. Hetta merkir m.a., at luttakararnir beinan vegin merkja, at nakað serligt er á vási, tá trinið verður inn í hølini.

Duravørar í tjóðarbúna taka ímóti luttakarunum, og Thurid Samró vónar, at hondbóltsleikararnir, eins og fyri ári síðani, velja at gera nógv burtur úr klæðunum. Tá vóru so at siga allir luttakararnir uppsnolladir, og hetta var eisini við til at seta rættuligan dám á tiltakið.

Borðreitt verður við trimum vælsmakkandi rættum, og undir borðhaldinum verður tað Hilmar Jan Hansen, sum hevur leiklutin sum sonevndur toastmaster.

**Hæddarpunktið**

Hæddarpunktið á veitsluni er sjálvandi handanin av steypum til ársins venjarar, dómarar og leikarar av ymsum slag. Kjósanin av hesum er skipað soleiðis, at allir leikararnir á einstøku liðunum skulu greiða atkvøðu eftir seinasta leikumfar, og tá summi lið nú eru liðug við sínar dystir, er arbeiðið at telja upp atkvøður longu farið í gongd.

Til at seta enn meira dám á hendan partin av tiltakinum, varð ein serstøk fanfara skrivað, og varð henda spæld av Havnar Hornorkestri, tá nøvnini í ymsu bólkunum vórðu lisin upp.

Vinnararnir av einstøku bólkunum fáa steyp til ognar, og verða hesi latin av teimum stuðlum, sum eru við til tiltakið. Í alt eru átta bólkar, og eru hesir: Ársins dómarapar (Suðuroyðar Sparikassi), ársins venjari (Føroya Bjór), besti málskjútti (Faroe Seafood Prime), ársins málverji (Skipafelagið Føroyar), ársins álopsleikari, ársins verjuleikari (Trygd), komandi stjørnan (Atlantsflog) og ársins leikari (Eimskip).

**Og so verður dansað...**

Eftir at kjósanin av øllum hesum er liðug, og matur og dessert er komin væl og virðiliga niður um, stendur dansur á skránni.

Heldur ikki her spara hoyvíkingarnir upp á nakað, og til dansin hava teir fingið ikki minni enn bólkin, All aint Rain, sum eru tríggir av teimum, sum áður mannaðu væl umtókti bólkin, Kjølar.

Verður lagið eins gott og undanfarna ár, er lítið at ivast í, at hesir fáa eina strævna nátt, tí dansurin gekk við fullari ferð, og hondbóltsleikarar í góðari venjing møðast kanska heldur ikki skjótt, sum fólk annars gera.



*So at siga øll hondbóltsfólkini vóru uppsnollaði á veitsluni fyri einum ári síðani, og Thurid Samró vónar, at eins nógv verður gjørt burtur úr hesu ferð*